# Starvsfólk til Service Desk

**Elektron sóknast eftir dugnaligum og tænastuáhugaðum starvsfólki, sum dámar væl at hava nógvar bóltar í luftini ísenn.**

Tú verður partur av Service Desk, ið er andlit okkara til peningastovnarnar, WebBanka kundar og annars fleiri stovnar og virki á almenna og privata marknaðinum.

**HVAT VÆNTA VIT AV TÆR?**
Trúvirði og álit eru lyklaorðini í samrøðum við kundar okkara, og tí seta vit stór krøv til starvsfólki.

Fyri okkum er umráðandi, at tú:

- er fyrikomandi og álitisvekjandi
- er ábyrgdarfull/ur og miðvís/ur
- hevur eina góða telefonrødd og eitt smíl sum hoyrist
- er álítandi og hevur góðan málburð
- er góð/ur til at lurta og seta teg í kundans stað

Kennir tú teg aftur í hesum, er ikki so umráðandi hvørja bakgrund tú hevur. Tó hava umsøkjarar við viðkomandi útbúgving og/ella starvsroyndum fyrimun.

**HVAT KANST TÚ VÆNTA AV OKKUM?**
Tú verður latin væl í til uppgávuna, so tú frá byrjan hevur tær bestu fyritreytirnar at geva kundum okkara góð og jalig upplivilsi.

Tú fært møguleikan at styrkja teg bæði fakliga og persónliga, við at royna tínar førleikar í einum virki við sera góðum menningarmøguleikum.

Tú verður partur av einum úrslitasøknum og ágrýtnum toymi, har hugburðurin er, at ein góður stemningur og gott lag, sameint við einum munadyggum og álítandi arbeiðsavriki skapa tey bestu úrslitini.

**ÁHUGAÐ/UR?**
Um tú vilt vita meira um starvið kanst tú seta teg í samband við Andrew Jensen á tel. 545176 ella við telduposti til adj@elektron.fo.

**UMSÓKNARFREIST**
Umsóknir við avriti av møguligum prógvum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. mai 2009, og skulu sendast til:
P/F Elektron, Staravegur 9, Postboks 3219, FO-110 Tórshavn,
ella við telduposti til ulla@elektron.fo.

**P/F elektron**
Staravegur 9 • P.O. Box 3219 • FO-110 Tórshavn
Tel: +298 345100 • Fax: +298 345101 • www.elektron.fo

elektron




Starv sum skrivstovufólk á Lønjavningarstovuni verður við hesum lýst leyst at søkja til setan frá 1. juli 2009 ella eftir avtalu. Talan er um parttíðarstarv.

***Starvsøkið***

- skráseting av avreiðingum og mynstringum
- viðgerð og avgreiðsla av fiskivinnustudningum
- telefonavgreiðsla
- aðrar fyrifallandi uppgávur

Harumframt verður roknskapareftirlit møguliga eisini partur av starvsøkinum.

***Førleikakrøv***

- HH, skrivstovuútbúgving ella onnur viðkomandi útbúgving
- góður telduførleiki á brúkarastigi
- sjálvstøðugt arbeiðslag
- góð samskiftis- og samstarvsevni

Fyrimunur er at hava roknskaparkunnleika og kunnleika til FSL-skipanina, men hetta er ikki ein treyt.

***Setanartreytir***

Lønar- og setanartreytir eru sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og deildir/stovnar tess, umframt um hini aðalráðini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin er í løtuni á Lønjavningarstovuni.

Lønjavningarstovan er skipað sum deild í Fiskimálaráðnum, og tann, ið fær starvið, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

***Umsóknir***
Umsóknir við avritum av prógvum, lívrensli og møguligum viðmælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 18. mai 2009 kl. 12.00.

Umsóknir skuldu sendast til:
**Lønjavningarstovan**
Postsmoga 347
110 Tórshavn
ella til fisk@fisk.fo.

Vilt tú hava meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at ringja til Hanna Thomsen, deildarstjóra, tel. 353030.

Fiskimálaráðið

**Lønjavningarstovan er deild í Fiskimálaráðnum. Høvuðsuppgávurnar hjá Lønjavningarstovuni eru:**
*at veita fiskivinnustuðul, so sum inntøkutrygd til fiskimenn, sjúkratrygd, forskot til langfarafiskimenn, stuðul til fiskaflutning og umsiting av mynstringum og avreiðingarhagtølum.*

SENDISTOVAN